

## Leyst starv

**Reingerðarfólk til Dagstovnin millum Bóla**

Søkt verður eftir reingerðarfólki at arbeiða 18 tímar um vikuna, aðruhvørja viku at byrja skjótast til ber. Starvið er fyribils galdandi til 1. februar 2006.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Umsóknir skulu verða Dagstovninum millum Bóla, í Líðini 20, 410 Kollafjørður í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. september 2006.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Elsu Nielsen, stovnsleiðara, tlf. 421375.

**Lesið meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**

www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

## Útgjalding av vinningsbýti

Á aðalfundi 29. mei 2006 varð samtykt at gjalda vinningsbýti til partaeigararnar. Vinningsbýtið er 100% av partapeninginum, t.e. kr. 5.050.000.

Fyri at tað skal verða møguligt at gjalda út, er neyðugt, at hvør einstakur partaeigari letur okkum hesar upplýsingar:

- **Navn á eigara**
- **P-tal og kontonummar í peningastovni**
- **Litra og nr. á partabrævi**

Vit hava goldið vinningsbýtið til teirra, sum áður hava latið okkum omanfyri nevndu upplýsingar.

*Einans tey, sum eru skrásett sum eigarar, kunnu fáa útgoldið vinningsbýti og luttaka á aðalfundi.*

**P/f Tjaldur**

Postrúm 250 · 700 Klaksvík
Tlf. 45 75 00 · Fax 45 73 80
Teldupostadressa: status@post.olivant.fo

VASTI 459010

## STJÓRI TIL ARBEIÐSLOYSISSKIPANINA

Fyri Arbeiðsloysisskipanina verður søkt eftir stjóra at byrja skjótast til ber

**Um Arbeiðsloysisskipanina**
Høvuðsendamálini við Arbeiðsloysisskipanini eru sambært § 1 í løgtingslóg um arbeiðsloysis-trygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997:

- at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys
- at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði
- at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin

Arbeiðsloysisskipanin verður stjórnað av einum stýri, sum er samansett av 7 umboðum, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakara-feløgunum á arbeiðsmarknaðinum – verður valt av Føroya Landsstýri. 3 limir skulu umboða arbeiðstakarafeløgini, 2 limir skulu umboða arbeiðsgevarafeløgini, 1 limur skal umboða tað almenna og 1 lim velur landsstýrið beinleiðis, og hann skal verða formaður.

**Starvið**
Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Arbeiðsloysisskipanini við tilvísing til stýrið.

Stjórin skal í neyvum samstarvi við stýrið hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni av rakstrinum hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika.
- hevur hollan kunnleika til arbeiðsmarknaðar, vinnu- og búskaparlig viðurskifti í Føroyum
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- hevur hegni og hug til at leiða Arbeiðsloysisskipanina

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til Rasmussen & Weihe statsautoriserað grannskoðarafelag P/F í seinasta lagi 11. september 2006.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ole Guldborg Nielsen á telefon 35 17 00.

*Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

**RASMUSSEN & WEIHE**
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F

**International worldwide cooperation**

Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

Sosialurin 341800

Fimleikaárið 2006/07

## Ball-stikk

Kom í form við ballstikk. Við ballstikk-bóltinum fært tú rullað allan kroppin ígjøgnum, uppvant lið og vøddar, samstundis sum tú fært styrkt javnvágina og koordinatiónina. Blóðrenslið verður betrað, so at tað fyribyrgir áraknútar og appelsinhúð. Vit arbeiða allan kroppin væl ígjøgnum hvørja ferð.



Tilrættislagt fyri byrjarar og vandar.

Undirvísarar: Marjun Simonsen og Herborg Mikkelsen
Kostnaður: 400 kr. fyri 12 vikur

TEAM85

**Fimleikafelagið Ljósið**

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo